# Heðin Zachariassen er sjeyndi tingmaðurin

**Tað verður kortini ikki Poul Michelsen, ið verður seinni eykavaldi tingmaðurin hjá Fólkaflokkinum**

LØGTINGSVALIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*





*Heðin Zachariassen gjørdist kortini seinni eykavaldi tingmaður Fólkafloksins, tó at Løgmálaráðið mátti rokna væl og leingi fyri at koma til ta niðurstøðu, at Poul Michelsen kortini ikki skuldi á ting*

Longu valkvøldið varð spurningur settur við, um tað var rætt roknað, tá Poul Michelsen varð útnevndur sum seinni eykavaldi tingmaðurin hjá Fólkaflokkinum.

Í Norðurlandahúsinum vóru fleiri talkønir menn, ið hildu uppá, at forritið, ið roknar út valúrslitið, ikki var rætt, tá tað gav ta úrslit, at Fólkaflokkurin fekk tveir eykavaldar tingmenn í Suðurstreymoy.

Fólkaflokkurin fekk bert ein umdømisvaldan tingmann í Suðurstreymoy, tað var Bjarni Djurholm við 595 atkvøðum, og hann tók fyrsta plássið á fólkafloks-listanum frá Óla Breckmann, sum hevur verið fystvaldur, síðani 1994, tá Jógvan Sundstein gavst í politikki.

Óli Breckmann fekk 450 persónligar atkvøður, og gjørdist fyrri eykavaldi tingmaðurin hjá Fólkaflokkinum. Poul Michelsen fekk 335 atkvøður, og er nummar trý á listanum – og ov stuttur til tingsess hesaferð. Men um Bjarni Djurholm heldur fram í einum nýggjum landsstýri, so kann Poul Michelsen kortini væntað sær tingess.

Endin gjørdist so tann, at Heðin Zachariassen í Streymnesi fekk seinna eykavalda tingsessin hjá Fólkaflokkinum. Heðin Zachariassen var eisini eykavaldur á valinum í 2002, tá Fólkaflokkurin eisini var ov stuttur til ein umdømisvaldan tingess í Norðurstreymoy.

Heðin Zachariassen fekk 260 persónliga atkvøður.

# Vinnumálaráðið vil í Hægstarætt við aling

**– Tað er eitt óheppið tekin at senda, nú alarar og lángevarar stríðast fyri at halda vinnuni gangandi, at Vinnumálaráðið hevur søkt Procesbevillingsnævnet um loyvi at kæra avgerðina hjá Landsrættinum til Hægstarætt um veð í aliloyvunum siga Føroya Havbúnaðarfelag, Føroya Sparikassi og Føroya Banki í tíðindaskrivi**

TÍÐINDASKRIV

Undir yvirskiftini »Ikki veð í aliloyvum kortini« verður m.a. víst á í tíðindaskrivinum fylgjandi:

»Hin 15. desember 2003 avgjørdi Eystari Landsrættur, at tinglýsingarmyndugleikin hevur skyldu at tinglýsa veð í aliloyvum, um alari biður um hetta. Landsrætturin gekk við dómi sínum ímóti eini avgerð Føroya Rættur frammanundan hevði tikið.

Við hesum var vegurin opin fyri, at alarar kundu veita lángevarum sínum veð í aliloyvunum. Dómurin var sostatt ein hjálp til alararnar, sum í teimum sváru tíðum vinnan er í, hava trupult við at fáa til vega neyðuga og nøktandi fígging.

Eyðvitað aftra lángevarar seg at veita fígging til eina vinnu í trupulleikum, tá vandi er fyri, at lángevarar, um tað kemur til fíggjarligt skrædl hjá alara, mugu yvirtaka útbúnaðin og fiskin uttan aliloyvi. Uttan aliloyvi verða lángevarar forðaðir í at selja alivirkið víðari sum eina going concern.

Tað er væl skiljandi, at hesi viðurskifti í ovurhonds mun økja um tapsvanda lángevarans.

Alarar høvdu allar orsøkir at fegnast um dóm landsrættsins. Hann var sjálvandi somuleiðis til fyrimuns fyri lánsgevararnar. Men lánsgevararnir fara at laga seg til umstøðurnar. Ber ikki til at veita veð í aliloyvum fara kredittirnir at verða færri og minni.

Við støði í hesum er tað eitt vónbrot fyri alararnar og peningastovnarnar at frætta, at Vinnumála-ráðið hevur søkt Procesbevillingsnævnet um loyvi at kæra avgerðina hjá Landsrættinum til Hægstarætt.

Nú alarar og lángevarar stríðast fyri at halda vinnuna gangandi, er hetta eitt sera óheppið tekin at senda.« stendur í tíðindaskrivinum.



*– Tað er eitt óheppið tekin at senda, nú alarar og lángevarar stríðast fyri at halda vinnuni gangandi, at Vinnumálaráðið hevur søkt Procesbevillingsnævnet um loyvi at kæra avgerðina hjá Landsrættinum til Hægstarætt um veð í aliloyvunum siga Føroya Havbúnaðarfelag, Føroya Sparikassi og Føroya Banki*

*Savnsmynd*








*Mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík fær nú aftur dagligan leiðara. Starvið verður sett frá 1. mars og er fulla tíð*

*Savnsmynd*

# Leiðari aftur setast í Atlantis

**Fyri góðari viku síðani var lýsing í bløðunum frá mentanarhúsinum Atlantis í Klaksvík, har søkt verður eftir dagligum leiðara til húsið. Nikolina Olsen, forkvinna í húsastýrinum sigur, at um húsið skal koyra, so skal ein dagligur leiðari til**

ATLANTIS
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Nú søkir Atlantis aftur eftir dagligum leiðari. Eftir at ongin fastur leiðari hevur verið síðani í mai í fjør, roynir stýrið aftur at finna ein dagligan leiðara til mentanarhúsið.

Klaksvíkar býráð hevur økt játtanina til húsið við 200.000 krónum í ár, og hevur hetta óivað sína stóru ávirkan á, at leiðari nú aftur verður settur. Við teimum 200.000 krónunum eyka, fær Atlantis nú 700.000 krónur á fíggjarætlanini hjá Klaksvíkar býráð. Nikolina Olsen sigur, at útivið 300.000 krónur fara beint í útreiðslur og skuld. Sostatt hevur húsið tað dupulta av pengum at arbeiða við í ár í mun til í fjør. Og tað skuldi borgað fyri góðsku. Og man setan av leiðara verða tað fyrsta stigi í hesum.

Nikolina Olsen sigur, at fleiri umsóknir eru komnar inn, og tað letur til at áhugin fyri starvinum er góður. Hon sigur, at fleiri ringja eisini og spyrja seg fyri um ymiskt.

Starvið verður sett frá 1. mars og umsóknarfreistin verður úti tann 1. februar.

## Økja um aktivitetin

– Tann nýggi leiðarin skal arbeiða fyri meira aktiviteti í húsinum, sigur Nikolina, sum tó viðgongur, at talan neyvan kann verða um tey heilt stóru tiltøkini, tí tað eru einans 112 sitipláss í salinum.

– Tað eru nógv smærri tiltøk, sum egna seg avbera væl til at hava í Atlantis, sigur forkvinnan í húsastýrinum.

Mentanarhúsið Atlantis hýsir eisini biografinum, og harafturat húsast Klaksvíkar Sjónleikarafelag í kjallaranum. Tey venja ein leik nú, sum skal hava frumframførslu í februar, so tað eru fleiri viðurskifti, sum skulu passa saman í húsinum.

Húsið hevur nú koyrt síðani í mai í fjør uttan dagligan leiðara, tá táverandi leiðarin, Jógvan Eliasen, fór úr starvinum. Hann fíltist fleiri ferðir á, at umstøðurnar í húsinum ikki eru nóg góðar til at skipa fyri tiltøkum. Men nú fáa vit at síggja, hvussu verður við aktivitetinum í húsinum, tá ein nýggjur leiðari verður settur.







# Eldur í dýnu

Tíðliga seinnapartin sunnudagin fekk løgreglan í Havn eina fráboðan um eldsbruna. Tað var ein, sum ringdi inn og boðaði frá eldi í einum grannahúsum. Talan var tó ikki um stóran eldsbruna. Ein fullur maður hevði fest sær í eina sigarett, og á ein ella annan hátt var eldur komin í dýnuna. Møguliga var maðurin sovnaður við sigarettini í songini.

– Ongin skaði hendi kortini uttan við dýnuni, sum varð nakað brend, sigur vakthavandi.

**–sae-**

# Fleyg eftir vegnum

Løgreglan í høvuðsstaðnum fekk eina fráboðan leygarnáttina frá einum, sum býr við Sundsvegin, at viðkomandi hevði hoyrt ein bil flúgva eftir vegnum. Tann, ið boðaði frá, segði, at bilurin hevði eina øgiliga ferð.

Løgreglan fór so avstað og funnu stutt eftir bilin. Tá var hann farin út av vegnum, og við rattið sat ein maður uttan vit.

Staðfest varð, at talan var um rúsdrekkakoyring. Bilførarin varð fluttur á skaðastovuna, men hevði tó ikki fingið nakran stórvegis skaða. Hann verður nú ákærdur fyri rúsdrekkakoyring.

**-sae-**

# Fleiri ferðsluóhapp

**Løgreglan sigur frá fleiri ferðsluóhappum um vikuskiftið, men annars hevur sum heild verið stak friðarligt kring landið**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fleiri smærri ferðsluóhapp hava verið í vikuskiftinum, men ongin fólkaskaði tíbetur.

– Tað er orsakað av hálkuni og so vanligt ósketni, sum aloftast enda við einum óhappi, sigur vakthavandi.

Inni á Sandvíkarhjalla var ein hurlivasi um áttatíðina sunnukvøldið, tá einir 10-15 bilar ikki sluppu nakran veg í hálkuni. Hóast har vóru bilar bæði við lamell dekkum og píkadekkum, so var so mikið hált og rokaligt, at ongin slapp nakran veg. Løgreglan kom á staðið, og tað gekk ikki long tíð, so kom glið á ferðsluna aftur, og hon kundi koyra sum vanligt.

### Tvey óhapp í Eysturoynni

Tvey smávegis ferðsluóhapp vóru í Eysturoynni um vikuskiftið. Eitt var á Skála og eitt á Norðskála. Í báðum førum var orsøkin hálka. Tann fyrri bilurin fór út av vegnum, og hin rendi inn í autoverjuna. Ongin fólkaskaði var. Annars hevur vikuskiftið verið friðarligt í Eysturoynni, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Runavík.

Úr Klaksvík verður sagt frá avbera friðarligum vikuskifti. Heldur ongin fráboðan er komin um nakra ferðsluóhapp har.